# Fyrsta misálitisuppskot á løgmann nakrantíð

**Tá atkvøtt varð um misálitisuppskotið, sum Tjóðveldisflokkurin hevði sett fram ímóti løgmanni, fall tað við 18 atkvøðum í móti, 9 fyri og 1 blankari**

MISÁLITISUPPSKOT

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tey, sum atkvøddu fyri misálitinum, vóru tey sjey umboðini hjá Tjóðveldisflokkinum, sum vóru til staðar og bæði umboðini hjá Miðflokkinum. Kári P. Højgaard í Sjálvstýrisflokkinum atkvøddi blankt.

Hetta var fyrstu ferð nakrantíð, at misálit er sett fram í móti einum løgmanni. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fyrireikaðu eitt misálit í móti fyrrverandi løgmanni Annfinni Kallsberg, men Kallsberg skrivaði út val, áðrenn misálitið varð sett fram.

Meðan viðgerðin av misálitinum var fyri á tingið, helt samgongan seg burtur úr salinum. Einans umboð fyri andstøðuna luttóku í orðaskiftinum.

Onkrir samgongulimir komu av og á inn í salin, t. d. sótu Jógvan á Lakjuni og Kaj Leo Johannesen eina løtu í salinum, men teir viðgjørdu ikki málið. Óli Breckmann kom einaferð inn í salin, men setti seg ikki á sín sess, men millum áhoyrarnar.



### Okkara seinasti møguleiki

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum sigur við Sosialin, at hann metir misálitisuppskotið á Føroya Løgmann sum umboð fyri alt landstýrið, at vera seinasta møguleikan, Tjóðveldisflokkurin hevur.

Hann sigur, at lógin um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya er skrumblað ígjøgnum, og andstøðan er trumlað niður.

Hann heldur fram, at hetta er hjartablóð Tjóðveldisflokksins. Tí er neyðugt við hesum misáliti fyri at vísa, hvussu týdningarmikið hetta mál er. Hann heldur, at um Tjóðveldisflokkurin nakrantíð skal leggja eitt politiskt misálit fram, so er tað í sambandi við hetta málið.

– Málið um lógina um altjóðarættarligu sáttmálarnar er sekundert, men eisini í okkara primeru málum eru vit í andstøðu við løgmann og hava misálit á honum, segði Jenis av Rana, løgtingsumboð fyri Miðflokkin.

– Hetta landi eitur enn Føroyar, og ikki Kongeriget Danmark, for så vidt angår Færøerne, segði formaður Miðflokksins av tingsins røðarapalli, tá hann kunngjørdi, at Miðflokkurin fór at atkvøða fyri misálitinum móti Jóannesi Eidesgaard.

Jenis av Rana segði, at fyri hansara skuld kundi løgmaður pakka saman heldur í dag enn í morgin.

Kári P. Højgaard, løgtingsumboðið hjá Sjálvstýrisflokkinum, harmaðist um, at Tjóðveldisflokkurin hevði lagt misálit fram í móti løgmanni. Hann helt, at tá ein flokkur leggur eitt misálit fram, uttan at hava meiriluta fyri tí, so gerst atkvøðugreiðslan ein álitisváttan til Løgmann.

Hann segði, at sum leikur var farin seinastu dagarnar, so hevði hann ikki hug at geva Løgmanni eina álitisváttan. Tí vildi hann ikki atkvøða ímóti misálitinum.

Men hann helt eisini, at ein samgonga, sum 2/3 av Føroya fólki hevur valt, eigur at sleppa at sita skeiðið, og tí vildi hann heldur ikki atkvøða fyri misálitinum.

### Taktiskur brølari

John Johannesen úr Javnaðarflokkinum segði við Sosialin, at Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt ein veldigan taktiskan brølara við at leggja eitt uppskot um misálit á løgmann fram, sum tey frammanundan vita verður felt.

– Flokkurin setur við hesum seg sjálvan uttan fyri alla ávirkan, segði hann.

Sambært John Johannessen er hetta ein roynd at draga viðgerðina út og at grugga málið fyri egnan politiskan vinning. Løgmaður Jóannes Eidesgaard hevði onga viðmerking til málið.

# Løgtingið gav mótmælinum streym

MÓTMÆLI

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í sambandi við tingfundin leygardagin skipaði Unga Tjóðveldið fyri mótmælisfundi uttan fyri tinghúsið. Tiltakið varð hildið undir heitinum »Føroya Løgting – Til sølu«.

Hetta var mótmæli ímóti politikkinum hjá samgonguni, serliga ímóti uttanríkispolitisku heimildarlógini, sum varð viðtikin í Løgtinginum.

Hóast mótmælisfundurin var ímóti Føroya Løgtingi, so noyddust mótmælisfólkini at banka á dyrnar hjá løgtinginum fyri at biða um streym. Ein leidningur varð lagdur inn í kjallaran á gomlu telefonstøðini, og so kundi ljóðannleggið tendrast.

Nøkur hundrað fólk luttóku á fundinum. Røðarar vóru Rúni Nielsen, Marna Jakobsen, Kaj Vágfjall og Oddfríður Rasmussen.

Umframt røðurnar luttók eisini fullveldispunkbólkurin 200. Tað spældi ikki stillisliga av, har vóru punk klassikarnir, »Jóannesar táttur« og »Visse tú ikki ert við uppá loysing, so ert tú skíti klikkaður« _ hesin seinni við nýggjum heiti og teksti: »Kongeriget Danmark, for så vidt angår Færøerne«, men eisini løgini av nýggju fløguni »Null hugsjón«, »Hin sambandsflokkurin«, »Tað stóra bankaránið« og »Drotningavitjan«.




*200 punkaðu sín mótmælisboðskap á mótmælisfundinum hjá Unga Tjóðveldinum leygarmorgunin*

*Mynd: Niels Uni Dam*

Meðan 200 spældu var gangurin øðiligur inni í Løgtinginum, og nógvir tinglimir reistust fyri at hyggja út gjøgnum gluggan.

## Fólkafloksungdómur stuðlar samgonguni

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Torkil Rasmussen, sum er talsmaður fyri Huxa, felagið hjá fólkafloksungdómi, sigur, at Huxa ikki hevur nágreiniliga viðgjørt lógina um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya. Men at felagið sum er stuðlar samgonguni.

Hann sigur, at hetta er ein meira víðfevnandi heimastýrislóg. Og at tað er gleðiligt, at føroyingar hava fingið vald at yvirtaka fleiri øki.

Hetta gevur arbeiðsróð og steðgar togtoganini við danir.

Hann skilir tó væl, at Unga Tjóðveldið, og onnur tjóðveldisfólk eru illa nøgd. Við hesum máli er samgongan komin so langt á tjóðskaparleiðini, at Tjóðveldisflokkurin lítið og einki hevur eftir at stríðast fyri.



*– Við hesum máli er samgongan komin so langt á tjóðskaparleiðini, at Tjóðveldisflokkurin lítið og einki hevur eftir at stríðast fyri., heldur Torkil Rasmussen, talsmaður fyri Fólkafloksungdóm*

*Mynd: Niels Uni Dam*